## 150 tímar við fótbólti

SvF fer at senda umleið 150 tímar av fótbólti frá HM-endaspælinum í Týsklandi.
Flestu HM-dystirnir verða sendir beinleiðis. Í innleiðandi kappingini verður sum oftast ein dystur klokkan tvey, ein klokkan fimm og ein klokkan átta. Teir verða allir sendir beinleiðis. Í sambandi við dystin um kvøldið er HM-studio kl. 19.30 við ymiskum tilfari frá sjálvum endaspælinum, og stundum verða eisini føroyskar meiningar um dystirnar í sjónvarpsstovuni.

Av teimum 64 dystunum í HM-endaspælinum eru tað bara fýra dystir, ið Sjónvarpið ikki sendir í fullari longd. Skráin hjá Sjónvarpinum verður nógv ávirkað av HM-fótbóltinum. Frá týskvøldinum eftir hvítusunnu verður Dagur & Vika klokkan sjey, og barnasendingarnar verða klokkan hálvgum fimm. Tey kvøldini Dagur & Vika ikki er, er barnasending á skránni klokkan sjey.

**-mørk**

## Oddsini frá Dansk Tipstjeneste

***Hvør fer víðari úr bólki E***

| | |
|---|---|
| Italia & Kekkia | 1,55 |
| Italia & USA | 3,90 |
| Italia & Ghana | 5,00 |
| Kekkia & USA | 8,50 |
| Kekkia & Ghana | 12,00 |
| USA & Ghana | 30,00 |

## Bólkur E

### GHANA

**Málverjar**
Sammy Adjei
George Owu
Richard Kingston

**Verja**
Samuel Koffour
Emmanuel Pappoe
Illiasu Shilla
Habib Mohammed
John Pantsil
Dan Quaye
Eric Addo
Issah Ahmed
Haminu Dramani

**Miðvøllur**
Hans Sarpel
John Mensah
Michael Essien
Derek Boateng
Stephen Appiah
Sulley Muntari
Otto Addo

**Álop**
Asamoah Gyan
Alex Tachie-Mensah
Matthew Amoah
Razak Pimpong

### ITALIA

**Málverjar**
Gianlugi Buffon
Angelo Peruzzi
Marco Amelia

**Verja**
Morgan De Sanctis
Cristian Zaccardo
Fabio Cannavaro
Andra Barzagli
Alessandro Nesta
Massimo Oddo
Marco Materazzi
Danieli Bonera

**Miðvøllur**
Fabio Grosso
Daniele De Rossi
Gennaro Gattuso
Maoru German Camoranesi
Simona Barone
Gianluca Zambrotta
Andrea Pirlo

**Álop**
Alessandro Del Pioro
Luca Toni
Francesco Totti
Alberto Gilardino
Vincenzo Iaquinta
Filippo Inzaghi
Simone Perrotta
Marco Marchionni

### KEKKIA

**Málverjar**
Petr Cech
Jaromir Blazek
Antonin Kinsky

**Verja**
Zdenek Grygera
Pavel Mares
Martin Jiranek
Tomas Ujfalusi
David Rozehnal

**Miðvøllur**
Thomas Galasek
Radoslav Kovac
Marek Jankulovski
Libor Sionko
Karel Poborsky
Tomas Rosicky
Pavel Nedved
David Jarolim
Jan Polak
Jarosla Plasil

**Álop**
Jan Koller
Vratislav Lokvenc
Milan Baros
Jiri Stajner
Marek Heinz

### USA

**Málverjar**
Tim Howard
Kasey Keller
Marcus Hahnemann

**Verja**
Chris Albright
Carlo Bocanegra
Pablo Mastroeni
Steve Cherundolo
Gregg Berhalter
Jim Conrad
Oguchi Onyewu
Eddie Pope

**Miðvøllur**
John O'Brien
Eddie Lewis
Clinton Dempsey
Claudio Reyna
Ben Olsen
Bobby Convey

**Álop**
Eddie Johnson
Brian Ching
Josh Wolff
DaMarcus Beasley
Brian McBride
Landon Donovan

# Burtur við catana

**Teir duga framvegis at verja. Men Italia anno 2006 er eitt fótbóltslið, sum eisini dugur so øgiliga nógv meira enn tað**



HM BÓLKUR E
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við Buffon í málinum, Cannavaro og Nesta í miðverjuni og altíð hart stríðandi Gattuso á miðvøllinum, sleppur eingin lætt framvið italiensku verjuni. Júst verjuspælið hevur søguliga verið tiltikið fyri Italia, og tað so væl kenda Catanaccio – heingilásið – hjá Inter var fyri nógv ein andsøgn til fótbóltin.

Í dag verður sterka verjan tó ikki bara nýtt sum einasta vápnið undir italienska landsliðnum. Heldur verður sterki defensivurin nýttur sum útgangsstøðið, sum skal tryggja at liðið eisini flytur bóltin frameftir á vøllin. Ein tryggur grundvøllur, sum eisini ger tað gjørligt hjá venjaranum at hugsa meira frameftir.

Venjarin nú er Marcello Lippi, og honum dámar eisini sera væl at spæla fótbólt niðan eftir vøllinum. Við monnum sum Pirlo, Zamborttа, del Pier, Totti, Toni og øðrum tykist hann eisini hava fólkið til tess, og tí skal eingin verða tikin av bóli, um Italia kemur heilt langt í HM-kappingini. Eisini hóast bæði Kekkia og USA eru framman fyri stilvalandið á styrkislistanum hjá FIFA.

### Nýggjur toppskjútti

Av øllum framrættaðu nøvnunum, er Luca Toni kanska tann, sum tykist mest spennandi. Hóast hann sum 29 ára gamal bert hevur spælt 18 landsdystir, nú HM-endaspælið byrjar, so er eingin í Italia í iva um, at hetta er ein maður, sum dugur at gera mál.

Tað er ikki í teimum stóru feløgnum, at hann hevur gjørt so nógv um seg, men hann gjørdi hópin av málum, tá Palermo stríddi seg móti Seriu A, og somuleiðis sýndist hann sum ein vandamikil harri hjá Brescia, sum seinni fekk gleðina av honum.

Men tað er ikki fyrr enn nú – í Fiorentina – at Toni veruliga er eksploderaður. Soleiðis hevur hann í ár skrivað seg í søgubøkurnar við ikki færri enn 31 seriu A málum. Eitt tal, sum vit skulu leita langt aftur í søgubøkurnar fyri at finna. Og tað talið gerst ikki minni merkisvert, tá hugsað verður um stjørnuparaduna av stórum áleyparum, sum gjøgnum árini hava gjørt um seg í Italia.

Við sínum 194 sentimetrum og 89 kiloum er Toni ikki ein maður, sum verður fluttur uttan víðari, og saman við meira tekniskt gávaðum monnum hevur hann verið fastur partur av álopsspælinum, síðani Lippi tók við sum venjari.

Umframt at vera nýttur sum upplagdur target-spælari, so hevur Toni tó eisini eina óhugnaliga nøs fyri, hvar og nær møguleikarnir koma. Og er møguleikin har, so drálar hann sjáldan, tá smekkast skal til. Og eftir øll málini í Seriu A í ár, so tykjast flestu tifosi í Italia nú at rokna við, at Toni er maðurin, ið skal lyfta arvin eftir Paulo Rossi. Manninum, sum í 1982 gjørdist HM-toppskjútti við seks málum, tá Italia seinast vann HM-heitið.

### Gølan

Júst 1982 er helst eisini